SJÚKRAHÚS VERKIÐ

# ÚTBOÐSBRÆV

## Útboð av leigumáli til Klaksvíkar Sjúkrahús
## – smærri leigumál til læknar og onnur heilsustarvsfólk

Í sambandi við at Klaksvíkar Sjúkrahús fer undir heildarumvæling av starvsfólkabygninginum, hevur sjúkrahúsið tørv á at umhýsa læknar og onnur heilsustarvsfólk, ið vanliga búgva í starvsfólkabygninginum í sambandi við arbeiðsdagar og vakt.

Klaksvíkar Sjúkrahús leitar eftir smærri leigumálum; bæði 1- og 2-manskømur leigumál. Talan er um langtíðarleigu og verður tørvurin frá medio august 2025 og tvey ár fram.

**STAÐSETING**
Ætlaðu leigumálini skulu vera staðsett við stuttari gongufrástøðu til Klaksvíkar Sjúkrahús. Ynskiliga gongufrástøðan er ikki meir enn 7 minuttir.

**INNRÆTTING AV LEIGUMÁLUM OG LEIGUKOSTNAÐUR**
Leigumálini skulu vera í hóskandi standi, løtt at halda rein, gott inniklima og ikki verða ávirkaði av larmi útifrá (góðska).

Leigumálið skal vera við innbúgvi (tó ikki handklæðir, seingjarklæðir, lappar og viskistykkir), hava ein funktionellan køk/alrúm, gott WC við bað/brúsu og kamar/kømur. Leigumálið skal hava egna inngongd og internet (funktionalitet).

Tað skal upplýsast ein samlaður mánarligur leigukostnaður.

Tey, ið ynskja at bjóða leigumál fram, skulu viðfesta myndir av WC við bað/brúsu, køki/alrúmi og kamari/kømrum.

**VIÐGERÐ AV INNKOMNUM LEIGUMÁLUM**
Støða verður tikin út frá eini heildarmeting av góðsku og funktionaliteti í leigumálinum, staðseting og leigukostnaði. Prísur 50% og góðska 50 %

**FREIST AT BJÓÐA LEIGUMÁL FRAM**


Sjúkrahúsbrekka 1
FO-700 Klaksvík
Tel.: +298 45 45 45
ks@ks.fo
ks.fo

Tilboð skulu sendast inn til umsokn@ks.fo í seinasta lagi:

**Týsdagin, 27. mai 2025, klokkan 12:00**

Tilboð, sum koma inn eftir hesa freist, verða ikki tikin við til metingar.

**TILGONGD**
Tá freistin er farin, tekur Klaksvíkar Sjúkrahús støðu til, hvørji uppskot farið verður víðari við. Seinna umfar fevnir um vitjan av leigumálum, har ein ítøkilig meting kann gerast.

**SPURNINGAR**
Áhugaði kunnu venda sær til Alexandru á Dul, sjúkrahússtjóra, tel. 288922 ella t-post: alexandra@ks.fo, fram til freist at bjóða inn.

Vit gleða okkum at frætta frá tykkum.

Klaksvíkar Sjúkrahús